# garførur



*- Tíðin gongur alla tíðina, og hóast vit eru komin seint upp á "vognin" í hesi avtalu, vænti eg, at kumuleringsavtalan fer at geva føroyskari vinnu øktar møguleikar nú og frameftir, sigur Hans Jacob Mikkelsen í Vinnuhúsinum*

sjálvandi gongur báðar vegir.

**Kappingarføri**

Hans Jacob vísir á, at við kumuleringsavtaluni fer tað í stóran mun at snúgva seg um, hvør er kappingarførur – og hvør ikki er tað.

- Tað verður tann, sum kann geva besta prísin, ið vinnur. Tí ræður um at vera kappingarførur fyri at fáa sum mest burtur úr hesum nýggju møguleikunum. Avtalan gevur møguleikar at "handla" rávøruna milum tey lond, sum kappast í dag. So, tað verður nú, at vit veruliga fara at síggja, hvør stendur seg í kappingini, leggur hann aftrat.

**Flakavinnan**

Hans Jacob væntar, at eisini flakavinnan kann fáa nógv burtur úr avtaluni, nú møguleikar verða at keypa fisk, meirvirkað hann í Føroyum og selja hann á ES-marknaðin sum føroyskan fisk.

Hann vísir kortini á tað, sum stjórin í Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, segði í Degi & Viku hóskvøldið, har hann nam við tilknýtið, sum íslendski ísfiskaflotin hevur til virkini á landi.

- Sum eg havi skilt, sigur Hans Jacob, eru skip og virkir í stóran mun kn‡tt saman í Íslandi, og tí er tað ein spurningur, hvussu stóran áhuga íslendsku reiðaríini hava at landa fiskin til kappingarneytar í Føroyum.

Hann sigur, at í Føroyum er í flestu førum skott millum skip og virkir, og tí gevur avtalan eisini føroyskum fiskiskipum møguleikar at selja fiskin í øðrum londum, har fiskurin síðan kann virkast og seljast við upprunanum hjá tí landi, sum meirvirkar fiskin

Hans Jacob sigur, at kumuleringsavtalan leggur upp til eina betri og fríari kapping, har gjøgnumskygnið verður størri enn áður.

**Stórar fyritøkur**

- Avmarkingar kunnu tó liggja í, at stórar fyritøkur, sum hava tætt tilknýti til teir, sum levera ráfiskin, kunnu gera kappingina, sum annars átti at staðist av n‡ggju avtaluni, meira stirvna.

Men, sum hann tekur til:

- Tíðin gongur alla tíðina, og hóast vit eru komin seint upp á "vognin" í hesi avtalu, vænti eg, at kumuleringsavtalan fer at geva føroyskari vinnu øktar møgu leikar nú og frameftir, sigur Hans Jacob Mikkelsen í Vinnuhúsinum.

## Stjórar ikki at hitta

Sosialurin royndi í morgun at fáa viðmerkingar frá stjóranum á Føroya Fiskavirking og stjóranum á Rækjuvirkinum á Oyri til kumuleringsavtaluna, men hetta eydnaðist tíverri ikki, tí hvørgin teirra var at hitta.

Vit fara at venda aftur til, hvat avtalan ítøkiliga merkir fyri vinnuna, hvørjir fyrimunirnir eru, og hvørjir vansarnir eru.

Vit fara eisini at tosa við Bakkafrost á Glyvrum um, hvønn týdning avtalan hevur fyri laksavirkini, sum virka portionir úr laksi.

-v.

## 42 lond/ landslutir

**Hvørji eru londini í skipanini, og hvørji lond kunnu Føroyar nú samsavna uppruna við?**

VINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyar hava nú møguleika at skifta um uppruna á ráðvøru við 42 lond/ landslutir í skipanini, um til ber at fáa fr'handilsavtalur við partarnar.

Vit prenta her eitt yvirlit yvir londini í skipanini umframt eitt yvirlit yvir londini, sum Føroyar í dag kunnu samsavna uppruna við.

**Londini í skipanini eru:**

Føroyar, ES, Noreg, Esland, Sveits, Liktinstein, Bulgaria, Rumenia, Turkaland, Algeria, Egyptaland, Ísrael, Libanon, Marokko, Sýria, Tunis, Vestari Áarbakki og Gasa-geirin.

Føroyar kunnu samsavna uppruna við hesi lond: Ísland, Noreg, Sveits og ES (Belgia, Háland, Luxemburg, Tàskland, Frakland, Italia, Danmark, Bretland, Írland, Grikkaland, Portugál, Spania, Svøríki, Finland, Eysturríki, Póland, Ungarn, Slovenia, Kekkia, Slovakia, Estland, Letland, Litavia, Kypern og Malta.

lond/ landslutir í skipanini, um til ber at fáa fríhandilsavtalur við partarnar.

- Hetta mál er eitt sera gott sømi um, hvussu týdningarmikið tað er, at Føroyar eru væl umboðaðar í Brússel, soleiðis at til ber at hava tætt formligt og óformligt samband við ES-myndugleikar og áhugabólkar annars. Hetta vísir eisini, hvussu drúgt tað kann vera hjá einum triðja-landi at økja um



*Tað vóru Jóannes Ejdesgaard, løgmaður og Herluf Sigvaldsson, leiðari á uttanríkisdeildini, sum á tíðindafundi hósdagin greiddu frá kumuleringsavtaluni*
*Mynd: Jens Kr. Vang*